# Bint eina gráa kettu



# Tilfar

Tógv: Sandnes Fritidsgarn grátt, Navia Uno svart og ljósareytt, Navia Trio kirsuberjareytt (cerice)

2 stokkar nr. 5 og nr. 4

Fylla

Stoppinál

**Mannagongd:**

Kroppur: Kasta 22 eygu upp á stokk nr. 5 við gráum. Bint stiklavond aftur og fram til stykkið er umleið 35 cm (umleið 54 rillur). Læs av.

Høvd: Kasta 12 eygu upp á stokk nr. 5 við gráum. Bint stiklavond aftur og fram til stykkið er umleið 18 cm (umleið 34 rillur). Læs av.

Halin: Kasta 10 eygu upp á stokk nr. 5 við gráum. Bint stiklavond aftur og fram til stykkið er umleið 22 cm. Læs av.

**Seyma kettuna saman:**

Kroppur: Legg stykkið saman í helvt og seyma síðurnar saman. Lat fyllu í og seyma holið saman.

Høvdið: Legg stykkið saman í helvt og seyma síðurnar saman. Lat fyllu í og seyma holið saman.

Halin: Legg stykkið saman í helvt (eftir longdini) og seyma síðuna saman. Lat fyllu í og seyma holið saman.

Seyma síðan høvdið mitt frammalaga á kroppinum umleið 1 – 2 cm frá kantinum. Seyma halan mitt aftarlaga á kroppinum á kantinum.

Seyma hornini á kroppinum til bein (umleið 2-3 cm frá hornunum báðar vegir). Seyma oyrini út frá ovaru hjørnunum á høvdinum (umleið 2-3 cm frá horninum báðar vegir). Seyma síðan eygu (svørt), munn (svartan), kampar (svørt) og nøs (ljósareyða) á trýnið.

Bint sloyfu: Kasta 10 eygu upp á við Navia Trio kirsuberjareytt (cerice) á stokk nr. 4 og bint stiklavond aftur fram til tað eru 12 rillur. Læs av. Vint kirsuberjareytt tógv runt um miðjuna á stykkinum, soleiðis at tað verður ein sloyfa. Bint síðan sloyfuna um hálsin.